# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Jarleivur Hilduberg farin



Hósdagin 29. mai andaðist Jarleivur Hilduberg í Havn á Lágargarði 76 ára gamal.

Jarleivur, ella Hjørleif, sum hann vanliga varð nevndur, var ættaður úr Fuglafirði, sonur Karolinu, sum var ættað úr Fuglafirði, og Sofus sum var ættaður frá Gjógv.

Barnaárini búðu tey í Fuglafirði, tey vóru 5 systkin: Andrias, Hjalgrím, Hjørleif, Heðin og Klára. Tey fluttu seinni til Havnar at búgva.

Sum ungur fór Hjørleif í læru sum setari á prentsmiðjuni hjá Arnhold Øster í Havn.

Eftir lokna lærutíð arbeiddi hann eina tíð á blaðnum 14. September, og í 1956 fór hann til Danmarkar at arbeiða, fyrst var hann hjá Bording prentsmiðjuni, men tey nógvu árini arbeiddi hann á Politikken, beint við Ráðhúsplássi.

Hjørleif giftist við Maluni úr Klaksvík. Tey eiga trý børn: Rúna, Mathea og Øssur.

Hjørleif arbeiddi á Politikken, til hann í 1982 kom heim til Føroya at arbeiða á Sosialinum, sum tá hevði keypt eina nýggja prentimaskinu. Hóast Hjørleif ikki hevði lært at passa eina slíka, tók hann uppgávuna á seg. Hann var ágrýtin og nærlagdur og livdi heilt upp til tað álit, honum varð víst, og arbeiddi hann á Sosialinum til pensiónaldur.

## Minningarorð um pápa mín

# Torleif Sigurðsson

**Føddur 23.12.46 · Deyður 12.02.08**



Tungt er at seta seg niður at skriva nøkur orð um pápa mín, sum var so nógv fyri meg og mína familiu.

Fyri knapt 18 árum síðani bleiv okkara einasti beiggi knappuliga tikin frá okkum, í allar fagrasta veðri. Ikki vardi tað meg, at babba eisini skuldi fara so knappuliga frá okkum, eisini í góðum veðri har sól skein.

Babba var ein sera friðarligur maður, gjørdi ikki nógv um seg har hann var, hann var altíð klárur at hjálpa, var ikki bangin at geva eina hjálpandi hond um mann hevði brúk fyri tí, babba var ein sera kjerligur persónur, gloymdi ongantíð síni kæru. Eg kann ikki gloyma, tá eg ringdi norður til hann og fortaldi honum, at eg hevði átt, og at tað bleiv ein lítli Torleif sum vit fingu. Tá svaraði hann, hvat er tað tit hava fingið, ein son? ja, og nú verður tú uppkallaður, svaraði eg, ok verði eg tað? Eg hoyrdi hvussu stoltur hann bleiv.

Babba var ein kendur maður, og komst tað nokk av fótbóltinum, har hann var formaður í fleiri ár í FSF. Hann var við at seta Føroyar á heimskortið saman við hinum í FSF, og eri eg sera stolt av honum.

Babba var sera støðufastur við tað hann fekst við, hann var leingi deildarleiðari í Fk her í Klaksvík, og meini eg, at hann var har yvir 20 ár.

Hann var eisini áhugaður í politikki, hann sat í býráðnum í næstan 16 ár.

Babba hevði bátar, har hann átti Alfa Pilot. Eisini átti hann saman við øðrum Fiskimúla og Kvikk.

Babba gekk høgt uppí familiuna, hann var sera góður við teg mamma, har hann segði ofta hvussu góða konu hann átti, og hvussu góður hann var við teg. Hann var ikki bangin fyri at brúka orðið at elska, og altíð fekk tú eitt blómutyssi frá honum 31. januar, tí tað er tykkara brúdleypsdagur, og fekk tú eisini eina sera flotta í ár frá honum, 12 dagar áðrenn hann doyði, eisini har skrivaði hann, at hann elskaði teg.

Babba var eisini góður við okkum systrarnar og makarnar hjá okkum, tað segði hann fyri mær, tá hann ringdi til mín og bað meg koma eftir sær, vit koyrdu ein biltúr og prátaðu um mangt og hvat, millum annað segði hann hvussu glaður hann var fyri havnina norðuri á Áninum, har hann hevði havt ein fingur á, og var hatta eitt stórt hjartamál hjá honum, at fáa eitt gott atløgupláss her norðuri.

Babba var sera góður við abbabørnini og vóru tey eisini góð við hann. Tað var mangan, at børnuni fóru inn í kamari til abba at fáa eina søgu, har hann fortaldi um kópin í kjallarinum, sum hann átti, tá hann var ungur, og nógvar aðrar góðar søgur sum hann sjálvur pentaði saman.

Ikki er nøkur loyna at børnuni sakna abba sín, tað er fyri kortum eg gjørdi tey yngru hjá okkum klár at fara í barnagarð, vit eru á loftinum, tá letur úr Elsu Mariu „mamma nú skínur sólin og abbi eigur at snakka við menninir á bedingini, so eigur hann at koma til okkum“ so tað er tekin upp á, at tey eisuni sakna hann.

Góða mamma, tað er sera tungt hjá tær, fyrst at missa tín einasta son, so at missa tín elskaða mann. Tú var so góð við teir báðar, og ikki kann sigast hvussu stórur saknurin er hjá tær, men eitt er víst, at nú eru Steindor og babba saman heima hjá Jesupápa, og at har hava teir tað gott. Eisini vita vit, hvussu nógv babba saknaði Steindor.

Góða mamma, væl veit eg, at orð eru fátøk, men mín vón er, at Jesupápi vil styrkja teg í stóru sorgini, og tú veist at eg altíð eri at heita á, og vilja vit á Bakkanum hjálpa tær, um tú hevur brúk fyri tí.

Góði babba takk fyri alt tú vart fyri meg og familju mína, eg sakni teg, og eg elski teg.

Ærað veri minni um mín elskaða pápa, Torleif Sigurðsson.

**sofía.**

## Andlát og jarðarferðir

**Sjúrður Páll Nielsen** fer til gravar úr Gøtu kirkju, týsdagin kl. 13.

Jarðarferðin hjá **Marjun Fuglø** verður úr Kristianskirkjuni týsdagin kl. 13:30. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Marjun kunnu lata eina peningagávu til Sjómanskvinnuringin hjá KFUM og K í Klaksvík. Konta í Norðoya Sparikassa.

**Herfinnur Durhuus, Vestmanna**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 30. mai, 56 ára gamal. Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 3. juni kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin 4. juni kl. 14.

Jarðarferðin hjá **Jarleivi Hilduberg** verður úr Ebenezer týsdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Jarleiv, kunnu lata eina gávu til Lágargarð. Konta í peningastovnunum.

---

†

**Herfinnur Durhuus**
Vestmanna

andaðist á Landssjúkrahúsinum
fríggjadagin 30. mai, 56 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum
týsdagin 3. juni kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju
mikudagin 4. juni kl. 14.00.

---

†

Góða mamma okkara, omma, langomma,
vermóðir og systir okkara

**Annie Helmsdal Poulsen**
Leynar

andaðist í heiminum fríggjamorgunin
30. mai 2008, 90 ára gomul.
Bønarhald verður hóskvøldið kl. 20 í Katólsku kirkjuni.
Jarðarferðin verður úr sama stað
fríggjadagin 6. juni kl. 14.

*Familjunnar vegna*
**Guðrið, Ingun og Tova**

Tey, ið vilja minnast mammu við blómum, kunnu ístaðin lata Franciskanarakleystrinum KEIT eina peningagávu, konta í Eik.

---

**Dagurin**
**4. juni. Obtatus**, deyður umleið ár 390.